## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá kæri maður, pápi, bróður, svágur, og svigarsonur okkara

**Niels Hansen**
Tórshavn

doyði og varð jarðaður.

Ein serstøk tøkk til starvsfólkið á Landssjúkrahúsinum, Bergur D. Joensen, prest, sangarar, kirkjutænarar og tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað her.

Takk fyri blómur, kransar og heilsanir.

*Familjunnar vegna*
**Brynhild og Eirikur**

# Barnsligt og bláoygt

**Stjórin á Restorff, Óla Svend Nolsøe, heldur tað vera bæði barnsligt og bláoygt av Einari Waag, stjóra á Føroya Bjór at ákæra Restorff fyri at hava meldað bryggjaríið**

RÆTTARMÁL
*Solby A. Eliasen*

Í Sosialinum í gjár legði Einar Waag, stjóri á Føroya Bjór Restorff bryggjarí undir at hava meldað Føroya Bjór fyri ólógligar lýsingar.

Men hetta heldur stjórin á Restorff er púra burturvið.

– Vit royndu at finna nakrar karmar, sum vit kundu lýsa undir og samstundis halda okkum innan fyri lógarinnar mark, sigur Óla Svend Nolsøe.

Restorff vendi sær til fleiri fyri at fáa svarað teirra spurningum. Áðrenn tey fóru til fútan, høvdu tey verið í Vinnumálaráðnum og hjá Rúsdrekkasøluni. Síðani varð hildið, at fyri at fáa so gjølliga sum gjørligt at vita, hvat er loyvt og ikki, at tað mundi vera frægast at venda sær til fútan sjálvan og spyrja.

– Vit høvdu nøkur dømi upp á lýsingar við, har vit spurdu fútan, hvat var lógligt, greiðir Restorff stjórin frá. Hann er sannførdur um, at tað ikki var tað, sum gjørdi fútan varugan við lýsingarnar hjá Føroya Bjór.

– Fútin lesur bløðini, so hann hevði ivaleyst sæð lýsingarnar sjálvur og síðani tikið málið upp av sínum eintingum, vísir Óla Svend Nolsøe á. Hann leggur samstundis afturat, at tá var Restorff longu ákært, og tað var fútin, sum sjálvur tók málið upp.

– Tá vit vóru ákærd, so er ongin orsøk til at halda, at Føroya Bjór fór at sleppa, tí tá fútin fyrst er byrjaður við tílíkum ákærum, so má hann taka alt við, sigur Óla Svend.

Hann leggur dent á, at endamálið hjá Restorff við øllum hesum var ikki at ganga runt og spæla politistar, men heldur at finna út av, innan fyri hvørjar karmar tað er lógligt hjá teimum at lýsa.

– Einar átti heldur havt hugsað um, at vit møguliga hava bjargað Føroya Bjór úr eini klemmu, sum lættliga kundi havt verðið enn størri enn hon nú er, um tey høvdu hildið fram við tílíkum lýsingum, sigur Restorff stjórin at enda.



*Óla Svend Nolsøe, stjóri á Restorff, sigur, at Restorff hevur ikki meldað Føroya Bjór. – Vit royndu at finna út av, hvar teir lógligu karmarnir eru, sigur hann*

# Tráðleysu internetveitararnir við í Farice

TÍÐINDASKRIV

Fleiri nýggir veitarar av føstum interneti eru komnir eftir at latið varð upp fyri kapping á føroyska fjarskiftismarknaðinum.

Flestu teirra hava tikið seg saman í smápartafelagið, ið eitur "10. september 2002". Hetta hendi í september í sambandi við, at felagið aftanfyri Farice skuldi stovnast.

Farice er nýggi fjarskiftiskaðalin, sum skal binda saman Reykjavík, Tórshavn og Edinburgh, og skal tryggja føroyingum og íslendingum skjótari internet og tryggari samband við útheimin.

Eins og hinir veitararnir í Íslandi og Føroyum setti "10. sept. 2002" pening í Farice verkætlanina, sum allir vænta sær nógv av.

Við eru seks veitarar, sum millum annað veita fast tráðleyst internetsamband í høvuðsstaðarøkinum, á Skálafjørðinum, í Gøtu, í Fuglafirði, í Leirvík og í Klaksvík. Teir eru:

TeleTech
el & tele
Atlantic Online
Farodane
Hansoft
Tökni

Nevnast skal, at hesir veitararnir hava gott og væl helmingin av marknaðinum fyri fast internet í Føroyum.




# MFS – Lestrarkunning 2003

TÍÐINDASKRIV

Í viku 6 og 7 skipar MFS fyri einari lestrarvegleiðing fyri miðnámsskúlanæmingunum í Føroyum. Endamálið við vegleiðingini er at kunna tey ungu um víðari lesnað. Harumframt verður greitt frá ymsum fíggjarligum, socialum og praktiskum viðurskiftum. At enda fáa næmingarnar høvi at spyrja inn til ymisk viðurskifti, ið hava serligan áhuga.

Ferðaætlanin hjá MFS sær í ár soleiðis út (sí talvu niðanfyri):

MFS-vitjan 2003, vika 6 & 7
Mánadag 03.02.02
Fiskivinnuskúlin í Vestmanna 10:00-12:00
Týsdag 04.02.02
HF-skeið og studentaskúlin & Handilsskúlin á Kambsdali 09:00-11:00
Týsdag 04.02.02
HF-skeið og Tekniski Skúlin í Klaksvík 13:00-15:00
Mikudag 05.02.02
HF-skeið og Studentaskúlin í Hoydølum 13:00-15:00
Mánadag 10.02.02
Handilsskúlin í Havn 13:45-15:30
Týsdag 11.02.02
Miðnámsskúlin í Suðuroy – Vágur 13:00-14:25

Framløgufólk eru Guðrið Weihe og Annika Helgadóttir Joensen. Báðar eru við í MFS-Ráðnum og lesa ávikavist stjórnmálafrøði og sálarfrøði við Lærda Háskúlan í Keypmannahavn.

Holger Arnbjerg frá Altjóða Skrivstovuni tekur eisini lut í lestrarkunningini. Hann fer at kunna um víðari lesnað uttanfyri Danmark.

Tú kanst fáa meira at vita um MFS á heimasíðuni www.mfs.fo



# Hægri oljuavgjald fyri at sleppa undan príshækking

**Bæði tjóðveldisflokkurin og sjálvstýrisflokkurin nevna møguleikan at hækka avgjaldið á olju ella bensini fyri at sleppa undan hækka prísin á ferðaseðlum hjá Strandferðsluni**

FERÐASEÐLAPRÍSIR
*Áki Bertholdsen*

Skal avgjaldið á olju ella bensini hækka fyri at sleppa undan at ferðaseðlaprísirnir hjá Strandferðsluni hækkar?

Tað er ein møguleiki sum tveir av samgonguflokkunum, sjálvstýrisflokkurin og tjóðveldisflokkurin spæla sær við í hesum døgum.

Tað gera teir í sambandi við umbønina hjá Strandferðsluni um at fáa loyvi at hækka prísin á ferðaseðlum. Upplýst hevur verið, at hækkingin verður eini 20% í miðal.

Áðrenn hækkingin kann koma í gildi, skal landsstýrismaðurin í vinnumálum góðkenna hana og hann hevur gjørt av at leggja málið fyri landsstýrið.

Enn er endalig støða ikki tikin, men hjá trimum av teimum fýra samgonguflokkunum er tað við ringum tannabiti, at prísirnir skulu hækka.

Bæði tjóðveldisflokkurin, sjálvstýrisflokkurin og miðflokkurin í samgongu vísa á, at ein príshækking kemur at raka útjaðaran meinast.

Tí kundu bæði tjóðveldisflokkurin og sjálvstýrisflokkurin nevnt møguleikan at at ein ella onnur skipan fekst í lag, har fleiri herðar komu at bera príshækkingina hjá Strandferðsluni.

Bæði Kári Højgaard, formaður sjálvstýrisfloksins og Heini O. Heinesen, formaður tjóðveldisfloksins á tingi nevna tískil møguleikan at hækka avgjaldið á brennievni fyri at útvega Strandferðsluni meiri pening tann vegin.

Teimum báðum hevði dámt betri eina skipan, har upphæddin, sum Strandferðslan hevur brúk fyri, verður útjavnað á fleiri herðar fyri at sleppa undan at raka útjaðaran so meint.

Kári Højgaard leggur tó dent á, at tankin at hækka avgjaldið á brennievni, er ikki gjøgnumhugsaður serliga gjølliga og hann veit heldur ikki um tað ber til.

Men tosið um at allar leiðir hjá Strandferðsluni skulu kosta tað sama, heldur hann vera heilt burturvið.

Heini O. Heinesen nevnir eisini møguleikan at hækka veggjaldið.

– Men hækkar avgjaldið á brennievni, verða tað tey, sum brúka vegirnar mest, sum betala mest og tað hóvar mær betri, sigur Heini O. Heinesen.



*Bæði Kári Højgaard og Heini O. Heinesen eru tingmenn úr samgonguni. Fyri at sleppa undan at hækka prísirnar á ferðaseðlum hjá Strandferðsluni, nevna teir møguleikan at hækka avgjaldið á olju ella bensini*

### Slepst ikki undan

Bæði Heini O. Heinesen og Kári Højgaard ásannar, at tað slepst ikki undan at Strandferðslan fær meiri pening, tí sum er, gongur roknistykkið ikki upp.

Og Kári Højgaard sigur, at endar tað við príshækkingum, verður tað ikki sjálvstýrisflokkurin sum fer at leggja seg í buktina, verður tilmælið hjá Strandferðsluni og Vinnumálaráðnum einasti útvegur, tí tað er greitt, at peningur skal til, so ella so.

– Men príslegan má heldur ikki leggjast so, at fólk gevst at ferðast.

– Vit hava eisini samtykt eina fíggjarlóg við ávísum fortreytum og tað ber ikki til at renna undan, sigur Kári Højgaard. Og sjálvstýrisflokkurin er í øllum førum ikki sinnaður til at játtað Strandferðsluni eykajáttan við at hækka fíggjarlógina.

– Skal Strandferðslan hava eykajáttan á fíggjarlógini, skal tilsvarandi upphædd sparast onkra aðra staðni, sigur Kári Højgaard. Heini O. Heinesen heldur, at ferðaseðlaprísir eru so viðkvæmir, at hækka prísirnar, fara fólk afturfyri at ferðast minni og so er onki vunnið.

### Truplari fyri hvønn dag

Bjarni Djurholm sigur, at hann enn hevur hann ikki fingið endaligt svar frá landsstýrinum um príshækkingini, so tað verður í fyrsta lagi fyrst í næstu viku, at hon kemur í gildi.

Men hann vísir á, at jú longri tíð gongur, jú truplari verður at fáa roknistykkið at ganga upp og fyri hvønn dag sum gongur, uttan at prísirnir hækka, missur Strandferðslan einar 20.000 krónur.

Landsstýrismaðurin sigur, at hjá sær er málið rættiliga einfalt: Løgtingið skerdi játtanina til Strandferðsluna nógv meiri enn hann hevði ætlað og príshækkingin er ein avleiðing av hesum.

# Jenis av Rana angrar at hann góðtók fíggjarlógina

**– Príshækkingin hjá Strandferðsluni er ein avleiðing av at fíggjarnevndin tók landsstýrið av ræði, men hetta verður ikki tað einasta, sigur Jenis av Rana**

FERÐASEÐLAPRÍSIR
*Áki Bertholdsen*

– Eg má siga, at eg eri farin at angra, at eg atkvøddi fyri fíggjarlógini.

Samgongutingmaðurin, Jenis av Rana, staðfestir nú, at hann skuldi ikki havt góðtikið fíggjarætlanina, sum hann annars var við til at samtykkja beint fyri jól.

Hevði Jenis av Rana ikki atkvøtt fyri fíggjarlógini, hevði hon uttan iva verið feld og so kundi mangt verið øðrvísi.

Tað, sum fær samgongutingmannin at taka soleiðis til, er ætlanin at hækka prísirnar hjá Strandferðsluni.

Og hann leggur afturat, at tað eru fleiri aðrir tinglimir úr samgonguni, sum eisini iðra seg um, at teir lótu fíggjarlógina sleppa ígjøgnum Løgtingið í tí líki hon er í nú.

### Misálit á landsstýrinum

Jenis av Rana sigur, at ætlaða príshækkingin hjá Strandferðsluni er ein avleiðing av, at tinglimirnir hjá samgonguni í fíggjarnevndini rætt og slætt tóku landsstýrisfólkini av ræði.

– Landsstýrisfólkini hjá samgonguni høvdu lagt eina fíggjarætlan, við teimum upphæddum, sum tey hildu vera neyðugar, men kortini skarvar sama samgonga í fíggjarnevndini heilt munandi av hesum upphæddum.

Avleiðingin er, at nú manglar í á ymsum økjum og tað er onki at ivast í, at tað kemur at vera brúk fyri nógvum eykajáttanum í hesum árinum.

– Samstundis var tað eitt misálit av teimum heilt stóru, sum meirilutin í fíggjarnevndini vísti sínum egnu landsstýrisfólkum, tá ið hann skarvaði so nógv burturav játtanunum, sum landsstýrisfólkini høvdu sett á.

Hann sigur, at tí er tað ikki bara hann av tinglimunum hjá samgonguni sum nú angrar, at tey lótu meirilutin í fíggjarnevndini sleppa so lætt, tá ið fíggjarlógin var til viðgerðar.



*Jenis av Rana vil hava málið um príshækkingina hjá Strandferðsluni fyri á samgongufundi*

– Vit skuldu havt kravt álitið hjá fíggjarnevndini til viðgerðar í samgonguni, sigur Jenis av Rana, tí hann sær fyri sær, at fíggjarlógin fer at elva til stórar trupulleikar í samgonguni.

### Missa álitið

Jenis av Rana heldur, at samgongan kann ikki loyva sær at hækka prísin á ferðaseðlum hjá Strandferðsluni.

– Hendir tað, er vandi fyri at fólk missa álitið á tí útjaðarapolitikki og útoyggjapolitikki, sum samgongan hevur sett sær fyri at føra, sigur tingmaðurin fyri miðflokkin, tí hetta er í andsøgn við tað.

Hann sigur, at miðflokkurin hevur sent Løgmanni og landsstýrismanninum í vinnumálum skriv, har flokkurin ger sína meting greiða.

Miðflokkurin hevur hug at samanbera hetta málið við undirsjóvartunnilin.

– Tá ið mett varð, at prísurin at koyra ígjøgnum undirsjóvartunnilin var ov høgur, tók samgongan málið upp og landsstýrismaðurin fór upp í málið. Tað endaði við, at prísurin lækkaði munandi.

Jenis av Rana heldur, at hetta eigur eisini at vera mannamongdin hesuferð.

Var upprunaligi prísurin at koyna undir Vestmannasundi ein vanlukka fyri vágafólk, eru ætlaða príshækkingin hjá Strandferðsluni eisini ein vanlukka fyri útjaðaran.

Hann sigur, at uttan iva kunnu nógvar orsøkir vera til at siga, at hesi bæði málini kunnu ikki samanberast.

– Men tað kann samanberast á ein hátt og tað er, at talan er um borgarar í sama landi sum skulu hava møguleikan at ferðast til og frá og tað ber ikki til at gera mun á fólki, alt eftir, hvar tey búgva.

Miðflokkurin hevur onki ímóti, at Strandferðslan fær eina eykajáttan fyri at sleppa undan at prísirnar hækka.

Tí hevur miðflokkurin heitt á Løgmann og landsstýrismannin í vinnumálum um at leggja málið um príshækkingar hjá Strandferðsluni fyri samgonguna.